## DAGSINS MEINING

# Verið varin

Hetta er tann tíðin, tá tað alt ov oftani kemur fyri, at vanlukkur henda í ferðuni, vanlukkur, sum hava skaða ella deyða við sær. Einki kann vera verri enn slíkar høpisleysar og meiningsleysar vanlukkur í nógvu jólaferðsluni. Hvussu oftani koma ikki deyðboðini frá einum ferðsluóhappi beint undan jólum. Hví eisini júst á jólum plagar at verða tikið til, tá miðlarnir boða frá hesum ótespiligu tíðindum.

Tað er greitt, at hetta er ein ring tíð til ferðslu. Bæði tí at skjótt verður myrkt og tí sýnið er sera ringt, tá myrkur og regn renna saman. Eru fólk í svørtum klæðum og ikki brúka endurskin, so er næstum ómøguligt hjá bilførarum at fáa eygað á tey. Og tað er nettupp oftani undir slíkum umstøðum, at jólaóhappini henda í ferðsluni.

Heit verður her á øll, bæði bilførarar og fólk til gongu, um at vanda sær eyka nógv í ferðsluni hesa ársins tíð. Vit øll hava eina skyldu og ábyrgd í hesum sambandi. Tað ræður um at seta ferðina niður, tá koyrt verður í tættbygdum øki, við gonguteigar og har skúlar liggja nær vegnum.

Taka vit Havnina við síni nógvu ferðslu, so finnast her mong serliga vandamikil ferðslu"støð". Eitt teirra er uttan fyri handilin hjá Gunleivi við Landavegin. Her verður parkerað sum best ber til, tá farið verður til handils. Koyringin til og frá er sera tilvildarlig, og er nógv ferðsla og ringt sýni er ikki lukkuligt at vera til gongu. Og soleiðis kunnu dømi finnast kring allan býin.

Tó skal sigast, at myndugleikarnir hava gjørt nógvar ábøtur seinastu árið, tó oftani fyrst eftir, at óhapp og vanlukkur hava verið í teimum vandamiklu plássunum. So løgið tað nú ljóðar, so skulu tað oftani henda vanlukkur fyrst, áðrenn neyðugu ábøturnar verða gjørdar.

Saknur er annars í einum føstum ferðslutátti í okkara útvørpum, sum javnan sigur frá vandunum í ferðsluni. Hetta kundi so aftur verið nakað, sum tryggingarstovnar á einhvønn hátt stuðlaðu, tí tað má vera í teirra áhuga, at so fá menniskju og bilar sum gjørligt og helst eingi, koma til skaða.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eingin grund til stúran, alt er farið rætt fram

**Jóannes Eidesgaard**
*løgmaður*



Allar donsku lógarásetingarnar, ið nú eru kunngjørdar, hava verið í Løgtinginum, og kunngjørdu sáttmálarnir vóru galdandi frammanundan.

Løgmaður fer ikki at biðja Løgtingið viðgera lógir og sáttmálar, ið longu eru í gildi.

Hergeir Nielsen, tingmaður Tjóðveldisfloksins, hevur í bløðunum 8. desember sett mær nakrar spurningar um kunngering av ískoytum til NATO-sáttmálan og av donskum ríkislógum og kunngerðum herfyri í Kunngerðablaðnum B. Høgni Hoydal hevur tikið sama spurning upp í fyrispurningi til danska forsætisráðharran í Fólkatinginum. Her sigur hann, at ein røð av lógum og altjóða sáttmálum, sum Løgtingið ikki hevur viðgjørt, eru kunngjørd í november 2004. Hetta er ikki rætt.

**Viðvíkjandi altjóða krígsbrotsdómstólinum**
Fyrst skal verða greitt frá, at slíkar lógarkunngerðir, sum her verður talað um, eru samanskrivingar av upprunalógini við øllum broytingarlógum, sum eru gjørdar seinni. Allar lógarbroytingar, sum eru gjørdar í upprunalógini eru formliga góðkendar av Løgtinginum. Tí broytir samanskrivaða kunngeringin ikki rættarstøðuna, men talan er um eina pedagogiska hjálp til borgarar og politikkarar at fáa greiðari yvirlit yvir, hvat er galdandi.

Kunngerðin av samanskrivaðu lógunum er gjørd eftir føroyskum ynski, tí tað ger, at borgarin fær betur kunning um innihaldið í lógunum.

Viðvíkjandi kunngeringini herfyri av donsku kunngerðini um morarentusatsin

Í hesum hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum longu svarað. Her er svarið, at hetta eisini er eftir bókini, tí ásetingin hevur heimild í danskari ríkislóg, ið longu er sett í gildi her eftir galdandi reglum.

Somuleiðis svaraði landsstýrismaðurin spurninginum um lógarkunngeringina av samanskrivaðu lógini um dómstólin fyri krígsbrotsverk. Lógin varð sum ríkislógartilmæli løgd fyri Løgtingið í 1996, og uppskotið varð einmælt samtykt. Talan er nú um eina samanskriving av lógini við seinni broytingum til tess á ein greiðari hátt at kunna almenningin í Føroyum um galdandi rættarstøðuna.

**Kunngering av altjóða sáttmálum**
Fyrst er at siga, at NATO-limaskapurin hjá Kongsríki Danmarkar fevnir eisini um Føroyar. Hetta er ein veruleiki, antin einum dámar tað ella ikki. Tá ið Danmark staðfestir ein altjóðarættarligan sáttmála, eitt nú NATO-sáttmálan frá 1949 og seinni sáttmálar (fylgiskjøl) um nýggjar NATO-limir, verða eisini Føroyar bundnar av hesum, uttan so at umveldisfyrivarni verður tikið fyri Føroyum. Tað er ikki gjørt í hesum førinum.

Tað, at ein altjóðarættarligur sáttmáli verður lýstur í Føroyum, er at skilja sum ein kunning til borgaran her. Spurningurin, um ein slíkur sáttmáli er galdandi fyri Føroyar, er hafturímóti púra óheftur av, um hann er kunngjørdur her ella ikki. Eitt nú er sáttmálin (fylgiskjalið) frá 1955 um NATO-limaskap Vesturtýsklands, sum landið æt tá, longu galdandi í Føroyum, hóast hann ikki er lýstur her fyrr enn nú.

Soleiðis er við altjóðarættarligum sáttmálum. Øðrvísi er við lógum, tí tær skulu harafturímóti verða kunngjørdar í Føroyum fyri at galda her, bæði tá ið talan er um danskar ríkislógir og lógir givnar av Løgtinginum.

# Familjur jagstraðar av loftmiðlafólki

**John S. Myllhamar**



So fekk papparazzi liðið aftur eina »góða søgu« at endurtaka eina tíð frameftir um ein løgreglumann, sum er tikin við ov høgari promillu. Nú skal so hendan familjan seigpínast í tíðindasendingum fram móti jólum. Fáur man verja tað, tá ið vit stíga skeiv spor í lívinum. Men slíkum málum sum hesum, eiga politi og dómsvaldið at taka sær av og døma um, og ikki nakrir sensatiónshungrandi og kyniskir gøtudreingir í Havn, sum einki duga at takast við uttan at smíða onkra gølu.

Tá ið útvarpið og sjónvarpið endiliga skal leggja seg eftir at jagstra hin einstaka føroyingin, hví so ikki hava somu lóg galdandi fyri øll og viðgera teirra egna starvsfólk á jøvnum føti við øll onnur? Um loftmiðlarnir endiliga skulu fremja mannajagstran, so er lívsførslan hjá føroysku loftmiðlafólkunum og familjum teirra, minni enn so fullkomin. So har er eisini okkurt at fara eftir. Ongantíð hava vit hoyrt teir havt ein tíðindastubba um, at starvsfelagar teirra, dýrandi fullir hava gjørt tónleikasendingar ella lisið tíðindini í útvarpinum og sjónvarpinum. Hetta er hent meira enn einaferð. Tað hevði eisini verið ein yvirskrift at komið tivandi og algoystir við. Men so eigasørt. Ikki so mikið sum ein umbering, tá ið menn eru um at detta av framman fyri mikrofonini. Útvarpsfólkið er sostatt friðhalgað.

Nú hevur so Jógvan á Lakjuni givið teimum enn meira vald við at herða monopolveldið við ***einum*** starvsfólkahópi í útvarpi og sjónvarpi undir ***einum*** einaráðandi stjóra. Hetta lítla einsporaða herliðið, sum verður lønt við 3.500 krónum í tvingsulsgjaldi frá hvørjum húsarhaldi í landinum, eigur nú loftmiðlarnar og kann við tess tilkliptu og subjektivu tíðindum tyrannisera verjuleys menniskju, sum ofta ikki duga at verja seg, ella ongan møguleika hava til tess.

Ja, ikki ólíkt italienska Berlusconi tilstandinum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.